# Vælkomin á

# Dagstovnin við Landavegin




**Dagstovnurin við Landavegin**

Landavegur 84

Tlf: 302380

t.postur: dag-land@torshavn.fo

www.landavegur.fo


# Kunningarfaldari

**Innihald.**

Tilvenjing

Dagstovnurin við Landavegin

Upp- og afturlatingartíðir

Leiðsla & Starvsfólk

Klæðir

Leikur

Foreldrasamstarv

Foreldraumboð á stovninum.

Gjald – frípláss – Uppsøgn – Frídagar

Blæur – matur – føðingardagar – Sjúka – Afturvendandi tiltøk

Okkara mál

Vit vænta

Hey: ___________________________________________

Vælkomin á Dagstovnin við Landavegin.

Tú fert at ganga í: _______________________________________

Á stovuni arbeiða:

__________________________________________________________
__________________________________________________________

## Tilvenjing.

Fyri at barnið skal fáa eina góða byrjan hevur tað stóran týdning, at foreldrini geva sær góðar stundir, tá ið barnið byrjar á stovninum.

Tað er umráðandi, at bæði foreldrini og børn føla seg trygg tá barnið verður avleverað til okkum. Tað er umráðandi at siga farvæl og vinka, soleiðis at barnið veit, at tit fara. Hetta skapar tryggleika fyri barnið. Vit finna ein máta, sum hóskar til tykkara barn at siga farvæl uppá.

Tað er týdningarmikið, at tit siga einum vaksnum á stovuni frá, tá tit koma  og tá tit fara við barninum. Um onkur annar enn tit sjálvið koma eftur barninum, skulu tit siga okkum frá hesum. Vit hava ikki loyvi at lata barnið fara avstað við onkrum, sum vit ikki kenna.

Foreldur og avvarðandi eru altíð vælkomin at stegða á og práta við okkum.

**<u>Dagstovnurin við Landavegin.</u>**

Dagstovnurin við Landavegin er ein stovnur undir Tórshavnar kommunu. Stovnurin læt upp 1.august 2004

Á stovninum ganga børn í aldrinum 0-7 ár. Á stovninum eru fýra stovur.

Tvær vøggustovur, sum eita **Dreymsóljan** og **Tjarnarsóljan** tvær Barnagarðsstovur, sum eita **Gullsóljan** og **Sóljuflog**.

**<u>Upp- og afturlatingartíðir.</u>**

Stovnurin er opin allar yrkadagar frá kl. 7.30 til kl. 17.00. Børnini skulu verða á stovninum áðrenn kl. 9.30. Kemur barnið av onkrari grund seinni, verða tit biðin um at siga okkum frá til stovuna har barnið gongur.

Kemur barnið ikki á stovnin orsaka av frídegi ella sjúku, verða tit biðin um at ringja á stovuna og siga okkum frá. **Vit taka ikki ímóti børnum uttan fyri stovnin.**

**<u>Leiðari:</u>** Steinbjørn V. Olsen.

**Starvsfólk:** sí heimasíðu okkara www.landavegur.fo

Um jóltíðir hava vit stongt allar gerandisdagar millum jól og nýggjár.

Umframt hesar dagar hava vit stongt 3 vikur um summarið, í viku 29-30-31. Tórshavnar kommuna gevur teimum børnum, sum hava tørv á ti, eitt ansingartilboð hesa tíðina. Ein dagstovnur í kommununi er opin.

Árliga hevur stovnurin 2. Ráðleggingardagar, og hesar dagar er stovnurin stongdur. Dagarnir eru í desember og juni, lýst verður 8 vikur áðrenn.

**Klæðir.**

Við okkara skiftandi veðurlagi skal barnið hvønn dag hava heit klæðir, regnklæði og gummistivlar við. Vit spæla nógv við vatn, mold og sand, so vit dálka okkum illa – og tað ynskja vit at børnini skulu sleppa. Tað er tí neyðugt at børnini hava ivaleyst av skiftiklæðum við.

Tað er umráðandi, at klæðir og styvlar eru væl merkt við navni, og at tit saman við okkum minna barnið á at fáa síni klæðir á rætta pláss.

Tað er tykkara ábyrgd at rudda og halda skil á klæðum/klæðnarúminum hjá barninum. Vit heita á tykkum at tøma/hyggja eftur skiftiklæðum, draktum, regnklæðum stivlum v.m. hvønn fríggjadag.

## Leikur.

Foreldur hava sjálvi ábyrgd av leikum, sum børnini hava við á stovnin.

## Foreldrasamstarv.

Eina ferð um árið verður kalla inn til felagsforeldrafund í september. Her verða ymisk evni tikin upp, sum hava við barna- foreldra- og stovnslívið at gera. Eisini hoyra tit um, hvat gongur fyri seg á stovuni, har títt barn gongur.

Á felags foreldrafundum verður valt eitt foreldraráð. Foreldraráði hevur til uppgávu at bøta og styrkja um samstarvið millum foreldrini, stovnin og kommununa.

Garðhugni er í mai, har foreldur møtast til eina hugnaliga løtu saman í garðinum.

Árliga verður tað skipað fyri foreldraviðtalum. Viðtalurnar eru í februar. Her verða foreldrini boðin til pesónliga viðtalu við starvsfólkunum frá stovuni sum barnið gongur á. Her verður tosað um, hvussu tað gongur hjá barninum sum heild. Um tørvur er á eyka viðtalu, eru foreldrini vælkomin at seta seg í samband við okkum. Sjálvi loyva vit okkum eisini at heita á foreldrini, um vit meta tørvur er á tí.

**Foreldraumboð á stovninum.**

Dagstovnurin við Landavegin hevur 4 foreldraumboð. Hesi skipa fyri felagsvirksemi á stovninum. Foreldraumboðini hevur ein teldupost: **foreldrarad.landavegur@gmail.com**

Øll foreldur eru vælkomin at skriva t.d.  við hugskotum til eitthvørt, ið hevur við stovnin at gera, ella rís og rós.

**Gjald:**

Rokningin verður send á einum inngjaldskorti. Mælt verður til at tilmelda sjálvvirkandi gjaldsavtalu til gjaldskipanina.

Gjaldið er:

Barnagarðspláss:  sí www.torshavn.fo

Vøggustovupláss: sí www.torshavn.fo

**Frípláss:**

Møguleiki er fyri at søkja um frípláss til barnið. Fríplássið verður at roknað eftur inntøkugrundarlagnum árið frammanundan, ella um inntøkan broytist munandi verandi ári. Umsóknarblað fæst frá leiðarinum.

**Uppsøgn:**

Tá barnið verður tikið úr stovninum, er uppsagnarfreistin ásett til 2 mánaðir, galdandi frá 1. Ella 15. Í komandi mánaði. Boðast skal skrivliga frá til leiðaran.

**Frídagar:**

Stovnurin hevur árliga stongt hesar dagar: Skírishósdag, Langa Fríggjadag, 2.páskadag, Flaggdagin, Dýra Biðidag, Kristi Himmalferðadag, 2. Hvítusunnudag. Grundlógardag frá kl 12.00, Jólaaftan, 1-2 Jóladag og nýggjáraftan og nýggjárdag.

**Blæur.**

Børnini, ið gjalda vøggustovugjald, fáa blæur frá stovninum.

**Matur.**

Øll børnini fáa mjólk og millummála.

**Føðingardagar.**

Tá barnið hevur føðingardag, hevur tað møguleikan at bjóða køku, is ella okkurt annað á stovninum. Um tit ynskja at bjóða stovuni heim í føðingardag, eru tit vælkomin til tess.

**Sjúka.**

Tá eitt barn er sjúkt, hevur febur ella er illa fyri, kann tað ikki koma á stovn. Vit geva ikki heilivág! **Undantikið astma heilivág og CDT heilivág**.

Barnið skal kunna taka lut í vanliga gerandisdegnum á stovuni, eitt nú kunna fara út. Vinarliga sigið frá, um barnið ikki kemur á stovn vegna sjúku, og hvat bagir barninum – hetta vegna smittu. Um vit meta, at eitt barn er illa fyri, hevur febur, ringja vit eftur tykkum.

**Afturvendandi tiltøk.**

Jólahugni er hvørt ár fyrsta hósdag í desember.. Morgunmatur fyri foreldrum er síðsta fríggjadag í hvørjum mána undantikið juli. Morgunmaturin er á stovunum, sí kunning á stovuni. Nátturið fyri foreldrum í juni. Ommu & abbadagur á Grækarismessu. Garðdagur í mai. Felgasforeldrafundur í september.

**Okkara mál er.**

At vit, sum eru her dagliga, foreldur, børn og starvsfólk hava ein stovn, har vit øll kenna okkum væl, har vit virða hvønn annan og hava umsorgan fyri hvørjum øðrum.

At skapa rúm og tíð so børnini kunnu mennast – at tey vaksnu vísa virðing fyri kenslunum hjá barninum – at verða til reiðar at stuðla barninum á tí støði barnið er – at vísa tolsemi og hava álit á hvørjum øðrum – at læra børnini at finna hvíld at vera seg sjálvi og velja sjálvi – at tosa um hvussu vit hava tað – at øll eru góð til okkurt – at hjálpa hvørjum øðrum – at tosa ordiligt við hvønn annan og um hvønn annan. Her arga vit ikki – her takað vit væl ímóti nýggjum børnum og foreldrum.

**<u>Vit vænta.</u>**

At tit sum foreldur taka ábyrgd av menningini hjá barninum – at foreldrini tosa virðiliga um børn, foreldur, stovnin og starvsfólk á stovninum – at foreldrini hava álit á starvsfólkunum – at foreldrini tosa við starvsfólkini um ónøgd, ikki við børn ella onnur foreldur – at foreldrini eru opin fyri positivum samstarvi – at foreldrini eru reiðilig í samstarvinum – at foreldrini møta til foreldrafundir, foreldraviðtalur og onnur tiltøk, stovnurin skipar fyri.

”Er tað nakað gott,

sig tað við **øll**,

er tað nakað ringt,

sig tað so við **okkum**”

# Dagstovnurin við Landavegin

# Landavegur 84

**t.post: dag-land@torshavn.fo**

**www.landavegur.fo**

Leiðarin: 302380 – lokal 1

Dreymsóljan: 302380 – lokal 2

Tjarnarsóljan: 302380 – lokal 3

Gullsóljan: 302380 – lokal 4

Sóljuflog: 302380 – lokal 5

**Stovnur hjá Tórshavnar kommunu**

**www.torshavn.fo**